# Andreas Poulsen

## 18. 06.1960 – 21.01.2011

## in memoriam

*Kaldir kennast oss nú vindar,*
*havsins andadráttur við,*
*syrgið suðar lot um tindar*
*oman dal til havsins sig.*

*Stutt er leið frá kúr' til kœti,*
*mansins virkna æviskeið,*
*frá hans lív í mekt og mœti*
*til hann síðsta stig sítt steig.*
*----*
*Vit við tær í vinnu vóru,*
*har tú vísur okkum vart,*
*tá vit saman byrðar bóru,*
*bart tú altíð væl tín part.*

*Minnast teg for røður góðu,*
*tú so mangan bar við borð,*
*har mong mál til viðgerð lógu,*
*sum væl greiddust við títt orð.*

*Tú vart millum oss hin knái,*
*sum tað trupla aldri sá,*
*hollur altíð oss í ráði,*
*mangan loysn vár hjá tær lá.*

*Fryntligur, við kátum merki,*
*alvarsamur tá tað galt,*
*trúfastur í orð og verki,*
*vinur góður yvir alt.*
*----*
*Økisferðavinnuráðið,*
*virðir teg for tað, tú var,*
*hjartans tøkk frá oss tú fái,*
*at tú verk várt við oss bar.*

*Tíni øll Várharra varði,*
*nú tú fórst um evsta lið,*
*til eitt bú í hægri garði:*
*"Góði vinur, hvíl í frið".*

**Vit í økisferðavinnufelagnum í Eysturoy**



# Neurologur vitjar Parkinsonfelagið

Frá 16. - 19. februar 2011 fær parkinsonfelagið vitjan av Tove Henriksen, ið er neurologur á Bispebjerg sjúkrahúsi við sergrein í parkinsonsjúku.

Í samband við vitjanina verða tveir evnisdagar. 17. februar er tað FÁG 4, sum er undirfelag fyri sjúkrarøktarfrøðingar innan eldraøkið, ið skipar fyri.

Dagurin byrjar kl. 9 og endar klokkan 16 og er ætlaður sjúkrarøktarfrøðingum, fysioterapeutum og ergoterapeutum.

18. februar er tað parkinsonfelagið, sum skipar fyri. Dagurin byrjar klokkan 9 og endar klokkan 13:30 og er ætlaður limum felagsins, røktarstarvsfólki og øðrum áhugaðum, sigur nevndin í Parkinsonfelagnum.

---

Kunngjørt verður, at elskaði
sonur og bróðir okkara

**Jan Skæling**

andaðist mikudagin 26.01.11.

Jarðarferðin verður frá kirkjugarðskapellinum
sunnudagin 30.01.11 kl. 14.00.

**Magnus og Gudmund**

---



## TØKK

Í sambandi við, at okkara kæra kona,
mamma og systir

**Jóna Reinert Zachhau**

doyði og varð jarðað,
vilja vit takka øllum, sum vístu umsorgan,
vitjaðu og vóru um Jónu á sjúkrahúsinum.
Ein serlig tøkk til starvsfólkini á B6.
Øllum tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og
fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað og á
annan hátt hava sýnt samkenslu, takka vit
hjartaliga.

**Jackie, Rasmus, Andreas**
**og systkin við familju**

---

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá okkara kæra mamma, vermamma,
omma og langomma

**Elly Niclasen**
**Sørvágur**

doyði og fór til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Nancy og Helena**